# Nøvn

Magnus Gunnarsson
maggi@sosialurin.fo



# Albert Róin

**6. august 1936 – 8. oktober 2010**

## in memoriam



Tú komst so tíðum inn um gátt
við kvikum gongulagi,
tú íkast gavst til orðadrátt,
so snøgt sum loyst úr kvæði.

Tín kvikleiki í orð og tal,
tín sjónarring oss vísti,
og lívsroyndir í hópatal
so væl tín tala lýsti.

Tú fórt um høv, tú fórt om lond,
har væl tín vitan munti,
men altíð bundu best tey bond
til tey, tú heima unti.

Tú heima átti tíni øll,
í góðum rúmum korum,
tú lærdi tey um fjørð og fjøll
við góðum nýtum orðum.

Tú vart ein egin serlig sál,
so søkin í tí dulda,
at øll ei skiltu heilt tað mál,
tú goymdi í tí hulda.

---

Tú komst so mangan inn á gólv
at hitta tey, tú kendi,
um lív títt nærkaðist til tólv,
tú heilsaði og vendi.

---

Nú fórt tú um tann evsta flúr
at finna besta miðið,
har góð er havn at enda túr:
»Vár vinur, hvíl í friði«.

**pmp**

## Nøkur minningarorð um
# Mogens Holm Pedersen

Sunnudagin 10. oktober 2010 komu boðini um, at Mogens Holm Pedersen var deyður, 80 ára gamal. Við honum er ein trúgvur Føroyavinur farin.

Fyrstu ferð eg hoyrdi um Mogens var í sekstiárunum í brævi frá Einari Kallsberg, sum tá var útsendingur fyri danska fíggjarmálaráðið í Washington. Har høvdu hann og Sunnuva hitt eina Strandarkonu, Magnhild, sum var gift donskum manni, sum var útsendur til danska aðalkonsulátið í Chigago.

Tá ið eg sjálvur kom í danska uttanríkisráðið í 1976 var ein av mínum fyrstu tænastuferðum til New York á havrættarstevnu. Har vóru stórmál fyri Føroyar á skránni og munagóð føroysk luttøka í sendinevnd danska ríkisins. Har hittu vit Mogens og Magnhild. Mogens var tá á danska aðalkonsulátinum í New York. Tey vóru nógv saman við føroysku sendinevndini og buðu okkum heim til sín í Bronxville. Vinskapurin gjørdist sjálvsagt ikki minni av, at Magnhild og Sólvá, kona Atla Dam, vóru skyldkonur.

Mogens tók løgfrøðiligt embætisprógv í 1956. Frá 1958 til 1960 var hann fulltrúi á Ríkisumboðnum. Harvið fekk hann eitt tilknýti til Føroya, sum vardi alt lívið. Har fann hann konu sína, Magnhild, fødd Johansen, ættað úr Gørðum á Strondum, og hon bar Føroyar við sær í hjartanum allastaðni tey fóru: Til Pakistan, USA í tveimum umførum, til Fílabeinsstrondina í Afrika, við tænastu í Keypmannahavn inn í millum. Bæði vóru tey blíð, fryntlig og hjartalig, og mangur hevur sitið væl inni hjá teimum, bæði í heimi teirra í Rungsted og á ymsum bústøðum úti í heimi. Sera væl dugdu tey at halda gomul sambond viðlíka. Fýra synir fingu tey: Jens, sum doyði í bestu árum, Mortan, sum eitt skifti búði á Strondum og fekk sær konu har í sóknini, Daniel og Karl Johan. Og tann hjartagóða Magnhild hevði so eisini eina fosturdóttur heim við úr Pakistan, Malenu, sum tey ættleiddu.

Tá ið Einar Kallsberg alt ov ungur doyði í 1980 fór eg eitt skifti heim til Føroya at arbeiða í landsstýrinum. Tá var Mogens komin aftur í uttanríkisráðið og fekk hann í uppgávu at røkja starv mítt hesi árini 1980 – 1984. Hetta sama endurtók seg, tá ið landsstýrið árini 1993-2000 aftur hevði boð eftir mær, hesuferð til at leiða samráðingarnar við Bretland um landgrunsmarkið og taka lut í fyririeikingunum til oljuleiting. Hesi árini var hann trúfastur luttakari í óteljandi samráðingum um føroysk uttanríkisáhugamál og hevur veitt mangari føroyskari sendinevnd dugnað og hjálp. Mogens sýndi stóran áhuga fyri Føroyum og var væl lýddur av føroyskum samráðingarfólkum. Ein ferð, sum meg minnist serliga væl, var til stóru FAO-ráðstevnuna um fiskiskap í Róm í 1984. Á skránni vóru týðandi mál fyri framtíð Føroya, og væl mannað nevnd umboðaði tær politisku Føroyar: Pauli Ellefsen løgmaður, Annfinn Kallsberg, landsstýrismaður í fiskivinnumálum og Hilmar Kass, marknaðarnevndarformaður. Harumframt vóru vit tríggir embætismenn: Mogens, Tryggvi Johansen og eg. Ráðstevnan vardi næstan tvær vikur, men vit ferðaðust bíliga, sum charterturistar, allir við maka. Hetta vóru hendingarríkir dagar og hugnaligir afturat.

Hin 1. mai 2000, eftir at hann var fyltur sjeyti, gavst Mogens í uttanríkisráðnum. Hann hevði góða heilsu og spældi tennis til langt upp í sjeytiárini. Í hoyna vóru tey oftast nakrar vikur á Strondum. Seinastu tvey árini tók heilsan at bila. Hann maktaðist burtur av innvortis krabbameini og nú orkaði hann ikki meira.

Vit, sum hava kent Mogens sum arbeiðsfelaga, fara at sakna hann, men samstundis ugga okkum við minninum um at hava kent eitt sera dámligt menniskja. Størri verður saknurin hjá teimum, sum stóðu honum næst. Tey hugsa vit um við samkenslu.

Mogens verður jarðaður 14. oktober 2010 úr Hørsholm kirkju.

Í Lyngby 12. oktober 2010
**Árni Olafsson**

---

✝

## Andlát

Kunngjørt verður, at kæra systir mín

**Jonhild Matras Absalonsen**
**ættað av Viðareiði,**
**búsitandi í Keypmannahavn**

andaðist 10. oktober, 84 ára gomul.

*Fyri tey, ið varða av*
**Petra**

Tey, ið ætla at minnast Jonhild við blómum, kunnu ístaðin lata eina gávu til Heilafelagið.

---



## TØKK

Hjartaliga tøkk fyri sýnda samkenslu og hjálpsemi, tá okkara góða kona, mamma, omma og vermamma

**Malan Davidsen**
**Tórshavn**

andaðist og varð jarðað.

Tøkk til Jákup Olsen og Poul Færø fyri troyst og styrk ígjøgnum sjúkralegu.
Tøkk til tykkum, ið vóru um hana á Landssjúkrahúsinum og Sjúklingahotellinum Hotel Tórshavn.
Tøkk til Ebenezer og tykkum, ið hjálptu til við ervinum.
Tøkk fyri blómur, kransar og aðrar heilsanir.

**Familjunnar vegna**
***Åge Davidsen***